# Desember í Vági

30. nov Jólahugni í Suðuroyar Sparikassa 30. november kl. 16–18
letur jólabygdin upp. Gløgg, holukøkur og annað leskiligt til børnini
Barnakórið og Manskórið hjá Frelsunarherinum í Vági luttaka við sangi

1. des Jólatræið í Vági verður tendrað fríggjadagin 1. desember kl 18:00.
Anna Brattaberg Samuelsen, sigur nøkur orð. Hornorkestrið spælir og
Frelsunarherurin luttekur við sangi og tónleiki, og jólaevangeliið verður lisið.
Jólamenn koma við pakkum til børnini. Aftaná eru øll vælkomin út í húsið hjá
Frelsunarherinum til kakao og bollar

1. des Ársins jólasøla hjá Verkstaðnum á Bakka, verður frá kl.13:00 -18:00 í
húsinum hjá Handverkarafelagnum í Vági frá 01.12–06.12
Nógv pent jólaprýði til heimið

3. des Útvarpsguðstænasta í Vágs kirkju kl. 11:00

3. des VB skipar fyri stórum Jólabrunch í VB húsinum kl. 12:30. VB og VÍF
spæla kl. 15:00

4. des Javni hevur guðstænastu kl. 19:00 hjá Frelsunarherinum. Øll eru hjartaliga
vælkomin.

8.–9. des Futsalkapping í Vágshøll fyri gentur og dreingir, árg. 1997–2007. Byrjað
verður fríggjakvøldið kl. 18:00 og leygarmorgunin kl. 09:00. Tilmelding neyðug.

8. des Ungdómshúsið skipar fyri jólaborðhaldi í Stóra Pakkhúsið fyri ung kl.19:00
Tilmelding er neyðug!
Jólaborðhaldið er fyri 7.flokk og upp til 18 ár.
Á skránni er góður matur og undirhald. Kostnaður 50 kr
Komið í tykkara fínasta outfitti, og havið ein pakka við fyri 20 kr. til pakkaspæl
Seinasta freist at melda til er ónsdagin 6. des. hjá Ungdómshúsinum

9. des Anna og Ása hava jólasølu í Jólahúsunum, av vøkrum, heimagjørdum
jólaprýði, karamellsós, og súltaðum rótum. Sølan er frá kl. 13:00

9. des Bókaframløga í Miðlatúni kl. 14:00. Høgni Mohr fortelur um bókina
Fractura nasi. Møguleiki verður at ogna sær bókina og fáa hana signeraða

10.des Felagskonsert í Vágs kirkju kl.18:00 við fleiri kórum úr Suðuroynni. Tey, ið luttaka eru Ljómur, Streingjakórið í Porkeri, Sumbiarkórið, Manskórið hjá Missiónshúsinum á Tvøroyri og Orðið á Borðið

12. des VB hevur gott jólabingo í VB húsinum kl. 19:00

13. des Jólini verða sungin inn í Vágs kirkju k. 18:00.
Barnakórið hjá Frelsunarherinum luttekur við sangi. Luciagongd verður, og aftaná bjóðar kirkjan kaffi og køkur, og okkurt gott til børnini

15. des Jólastovan hjá Visit Suðuroy letur upp í Miðlatúni kl. 15:00.
Jólastovan verður opin hvønn dag frá 15:00—18:00 til 22.des. Nógv verður á skránni, so sum jólaklipp, jólasangur, jólasøgur og jólateknifilmur
At vitja Jólastovuna er ókeypis

15. des Jólastovan kl. 16:00: Arnfinnur lesur søguna
"Besta jólagávan", sum er um jólamannin, sum gerst forkølaður, og má fáa hjálp at bera gávurnar út til heimsins børn.
Ókeypis tiltak!

15. des Ungdómshúsið skipar fyri jólahugnakvøldi kl. 19:00 fyri børn úr 3.—6. flokki
Tilmelding er neyðug!
Á skránni verður góður matur, hugni og spøl. Tilmelding hjá Ungdómshúsinum, áðrenn 12.des. Tiltakið er ókeypis, men havið ein pakka við fyri 20. kr til pakkaspæl.
Komið í tykkara fínasta stási til eitt hugnaligt kvøld.
Minnist til at melda til áðrenn 12. des

16. des Handlarnir byrjað at hava leingið opið. Vitjið teirra facebooksíðir fyri nærri kunning

16. des Skótaliðið Royndin selir heitt kakao, nýbakaðar vaflur og toast í Jólahúsunum í miðbýnum frá kl. 13:00—20:00

16. des Rimmar dansur. Toppgunn og Kidd fara á pallin í Vágshøll kl. 23:30. Donsku harrarnir hava dominera donsku hitlistarnir, og síggja fram til eitt gott kvøld í Vági



**17. des** Vit syngja Jólini inn" hjá Frelsunarherinum kl. 16:00

**18. des** Teknifilmur í Jólastovuni frá kl. 15:00, umframt jólaklipp og hugni
Ókeypis tiltak!

**19. des** Jólastovan kl. 16:30. Jonhild lesur tvær søgur. Eina fitta søgu um tveir fittir smádreingir og eina stuttliga søgu
Ókeypis tiltak!

**24. des** Jólaguðstænata hjá Frelsunarherinum kl. 16:00

**24. des** Jólaguðstænasta í Vágs kirkju kl. 17:00

**26. des** Frelsunarherurin bjóðar børnum til jólaveitslu kl. 16:00

**26. des** Góður dansur í VB húsinum við Signari í Homrum

**28. des** Nýggjársnevndin selir fýrverk í Vilt húsinum, hvønn dag fram til nýggjársaftan, frá kl. 14:00–20:00

**28. des** FC Suðuroy selir fýrverk í húsinum hjá Vágs Handverkarafelag, hvønn dag fram til nýggjársaftan.

**31. des** Nýggjársnevndin bjóðar morgunmat í Billiardhúsinum kl. 10:00–12:00

**31. des** Kirkjurenning: Byrjað verður við Vágs kirkju, renna, ganga, ella súkkla til Porkeris kirkju, og aftur til Vágs

**31. des** Kyndlagongan byrjar við Vágs Skipasmiðju kl. 23:45.
Fylg við fyrireikingunum á Suðuroyarportalinum og á facebooksíðuni hjá Nýggjárshaldinum í Vági

**Øllum verður ynskt eini gleðilig jól**
**og eitt eydnuberandi nýggjár**

*Visit Suðuroy*